## ES skal kroysta Burma

Svenska stjórnin, sum hevur formansskapin í ES hetta hálvárið, er í øðini um, at andstøðuleiðarin í Burma, Aung San Suu Kyí, er dømd í húsavarðhald 18 mánaðir afturat. Svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, segði í gjár, at ES er í ferð við at fyrireika tiltøk ímóti Burma. Millum annað er talan um handilslig tiltøk ímóti fyritøkum, sum tað almenna í Burma eigur, samstundis sum leiðararnir í hesum feløgunum fáa forboð fyri at koma til nakað ES-land. Í London hevur Gordon Brown, forsætisráðharri, mælt til eitt altjóða forboð ímóti vápnasølu til Burma.



## Iran tikið amerikanarar

Myndugleikarnir í Iran váttaðu í gjárkvøldið, at teir hava tríggjar amerikanskar ríkisborgarar sitandi í varðhaldi. Í fráboðanini, sum varð send amerikonsku myndugleikunum umvegis sveisisku sendistovuna í Teheran, stóð, at amerikanararnir vórðu tiknir, tá teir komu ólógliga um markið úr tí kurdiska økinum har norðuri í Irak tann 31. juli. Trygdarráðgevin í Hvítu Húsunum, James Jones, sigur við AP, at amerikonsku myndugleikarnir fara at krevja at sleppa at tosa við teir tríggjar fangarnar sum skjótast.




*Mortan Johannesen við fiskinum, sum hevur órógvað hansara snelluveiðu seinastu dagarnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ein óvanligur fiskur

**Seinastu dagarnar hevur Mortan Johannesen næstan ikki fingið roynt eftir upsa, tí har hevur verið so nógv av einum stórum fiski, ið hann ongantíð áður hevur fingið. Fiskurin er helst bramafiskur, heldur Hjalti í Jákupsstovu, fiskifrøðingur**

FISKASLAG
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er einki óvanligt í tí, at bátar, sum royna undir Føroyum, fáa onkan hendinga fisk, sum teir ikki kennast við.

Men seinastu dagarnar hava teir, sum royna á Skeiva Banka, fingið fitt av einum fiskaslagi, sum teir ikki áður hava sæð.

Mortan Johannesen, sum alt sítt lív hevur fiskað, og tey seinastu árini hevur roynt við snellu, hevur ongantíð í lívinum sæð so stóra nøgd av hesum óvanliga fiskinum.

- Í einar tíggju dagar hava vit næstan ikki fingið roynt eftir upsa, tí hesin fiskurin gongur omanfyri, og hann býtur beinanvegin á, sigur Mortan Johannesen.

Hann hevur fingið fiskin á 30 til 70 favna dýpi.

Mortan Johannesen hevur koyrt nakrar fiskar í ís, tí hann vil fegin vita, hvat fiskurin kann brúkast til.

### Vitjar viðhvørt

Hjalti í Jákupsstovu heldur út frá myndini, at mest sannlíkt er fiskurin bramafiskur, sum sambært bókini Fiskar undir Føroyum summi ár tykist gera innrás í føroyskan sjógv.

Bramafiskur er at fáa undir Norðurnoregi, onkuntíð í Íslandi, men annars suðuri í Atlantshavinum, Indiahavinum og í Kyrrahavinum.



Um nakar fiskimaður í Føroyum droymir um at leggja seg eftir at fiska bramafisk við útflutnings, kann hann gloyma tað, tí her á leiðum hevur fiskurin ongan vinnuligan týdning havt.

## Trygdarmiðstøðin fær helst egið hús

**Heldur enn at byggja nýggja Trygdarmiðstøð ætlar Fiskimálaráðið at keypa ein bygning í Klaksvík, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

SKÚLI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Alt bendir nú á, at Trygdarmiðstøðin í Klaksvík skjótt fær egin høli.

Leingi hevur verið ætlanin at byggja nýggja Trygdarmiðstøð, og tað ætlaði henda samgongan eisini. Trygdarmiðstøðin skuldi byggjast við Borðarvík.

Men tá ið tað vísti seg, at byggikostnaðurin fór at verða 40 milliónir krónur, varð farið at kanna aðrar møguleikar.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaur sigur, at Fiskimálaráðið hevur samráðst við eigararnar av bygninginum, sum bara er fá ára gamal, og sum brúkast skuldi til timburhandil. Bygningurin, sum varð tikin í nýtslu, men fór illa av eldi, stendur á vestara arminum í Klaksvík, beint við Norðborg.

Jacob Vestergaard vil enn ikki út við, hvat bygningurin fæst fyri, men sjálvt um innrætting má gerast, verður húsið væl bíligari enn at byggja nýtt.

Skal tað almenna keypa henda bygning, má málið fyri løgtingið. Jacob Vestergaard væntar, at peningur til ætlaða keypið kann takast av íløgujáttanini.

Málið kemur heilt skjótt fyri tingið, sigur landsstýrismaðurin.